Jógvan Mørkøre, stýrislimur í ALS:

Tørvandi samhugur við tey arbeiðsleysu

- Ein loysn hevði verið, at tey alment løntu, sum eru betur fyri í samfelagnum, kundu latið ein part av sínum eftirlønargjaldi til ALS. Tað hevði ikki verið órímiligt, tá nú Samhaldsfasti varð tikin upp í skipanina, heldur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur



Jógvan Mørkøre, limur í stýrinum fyri ALS: - Øll vita, at Arbeiðsloysisskipanin kom ov seint. Tí var eisini neyðugt, longu áðrenn 12. oktober í fjør at biða dansku stjórnina um loyvi at gera undantak frá avtaluni, so skipanini kundi fáa pening um fíggjarlógina

- Trupulleikarnir í sambandi við Arbeiðsloysisskipanina eru lutvíst tengdir saman við, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki vilja gera ALS til felags ábyrgdarmál, sigur Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og stýrislimur í ALS.

- Úrslitið av hesum hevur verið, at ymsu partanir blaka málið í høvdið á hvørjum øðrum. Tað hevur verið gjørt í samskifti við fjølmiðlarnar, har báðir partar hava úttalað seg í málum, sum ikki hevur verið liðugt viðgjørt innanhýsis.

Broyttar fortreytir

- Umframt hetta stóðust trupulleikar av, at tað, sum í byrjanini skuldi verða ein sjálvboðin trygging fyri arbeiðsfólk í fiskivinnuni, endaði við at allir partar á arbeiðsmarknaðinum við lóg vóru trýstir inn í skipanina.

- Hevði skipanin hinvegin av fyrstu tíð verið gjørd til allar partar á arbeiðsmarknaðinum, so høvdu fortreytirnar eisini verið øðrvísi. Tá høvdu allir partar sýnt størri ábyrgd og staðið saman um at varðveita skipanina.

- Tað er hetta, sum nú er størsta forðingin og sum við tíðini koyrir skipanina á húsagang, sigur Jógvan Mørkøre.

Tá trupðulleikar vóru í ALS á vári í fjør, fór Hartvig Hansen, sum tá umboðaði fyri Starvsmannafelagið, úr stýrinum.

Í hansara stað valdi landsstýrið Jógvan Mørkøre, sum var í uppskoti saman við fýra øðrum persónum.

Gangur - tekin um demokrati

- Hvørjum gagnar tað, at limir í stýrinum fyri ALS áhaldandi hava mótmælt ymsum uppskotum, uttan tó at hava grundgivið fyri, hvat annað er til at taka?

- Tað er ein demokratiskur rættur at gera vart við seg. Tað, sum fólk kalla ósemjur og gangur er bert tekin um, at limirnir ikki hava verið hoyrdir. Stýrið hevur gjørt vart við, at skipanin ikki tolir at lántøku, men tað hevur landsstýrið ikki viljað góðtikið.

- Eg haldi at skipanin longu viknaði í fjør, tá tað var samtykt at læna Samhaldsfasta til ALS, og at lækka útgjaldið. Tó varð ein semja fingin í lag, móti at ein loysn skuldi finnast seinni. Vit vistu, at skipanin fór at mangla penining í ár.

- Tá tað ikki varð tikið hædd fyri at veita skipanini pening, eitt nú á fíggjarlógini, hóast stýrið hevði gjørt vart við seg, longu í juli mánaða í fjør, so var ikki løgiðat stýrið helt forsøgnina hjá Landsstýrinum, um at nóg mikið av peningini var í skipanini, meira vera ein dreymur enn veruleiki.

- Øll vita, at Arbeiðsloysisskipanin kom ov seint. Tí varð longu áðrenn 12. oktober í fjør, neyðugt at biðja dansku stjórnin um loyvi at gera undantak frá avtaluni, og at lata skipanini pening um fíggjarlógina.

Ikki órímiligt at tey alment løntu hjálptu til

- Ein onnur loysn hevði verið, at tey alment løntu, sum eru betur fyri í samfelagnum, kundu latið ein part av sínum eftirlønargjaldi til skipanina. Tað hevði ikki verið órímiligt, tá nú Samhaldsfasti varð tikin við, at tey vælbjargaðu eisini lótu nakað.

Trupulleikin er, at fólk ikki longur líta á politikarnar.

- Tá talan er um at gera fyribils loysnir, so er ofta niðurstøðan, at tað sum er fyribils, mangan verður til varandi skipan. Tí torir eingin at bjóða seg fram at hjálpa.

- Hvussu hevur samstarvið verið í stýrinum?

- Vit hava havt gott samstarv, til støðan gjørdist so fastlæst, tí hvørgin partur vildi geva seg.

- Stýrið vildi ikki góðtaka lántøku, og kortini setur landsstýrið uppskot fram um tað. Stýrið helt, at tað mátti borið til at fingið pening til vega á annan hátt enn lántøku. Ingeborg Vinther, vegna Arbeiðarafelagið og Óli Jacobsen, vegna Fiskimannafelagið søgdu, at limirnir ikki orkaðu at gjalda meira inn, og at skipanin ikki kundi bera lántøku.

- Eg umboði limir, sum kundu goldið meir, eins og onkur bólkur sum Óli Jacobsen umboðar, eisini kundi goldið meira. Tað kravdi kortini, at báðir partar vildu strekkja seg. Tað vildu teir ikki, og hervið var støðan so fastlæst, at als einki kom burturúr.

Hugstoytt

- Tað skulu tveir partar til at klandrast, og tveir til at gera eina semju. Tað ringasta, sum kundi henda var, at landsstýrið tók lán upp á framtíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini, og hervið máar støðið undan skipanini, sigur Jógvan Mørkøre, og skoytir uppí: - Tað er hugstoytt, at poltikarnir soleiðis frammanundan hava uppgivið skipanina. Tað vóru ja ikki politikarnir, sum vildu hava hesa skipan sett í verk.

- Upprunaliga var hon ætlað sum ein sosial trygd. Sum nú er, er einki grundarlag at byggja á.

- Forsøgnin, sum landsstýrið byggir sínar grundgevingar á, sigur bert, at fólk detta úr skipanini ella flyta. Hon sigur einki um, hvat fleiri túsund arbeiðsleys skulu liva av. Valið hjá teimum verður antin at liva í armóð ella at flyta av landinum.

- Eitt samfelag, sum ikki vil taka sær av sínum arbeiðsleysu, og sum letur eitt heilt ættarlið fara av landinum, upploysir seg sjálvt, sigur Jógvan Mørkøre.

Dagny

Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

torsdag den 07. april 1994, kl. 14.40

tvangsauktion, (AS 546/93) over matr. nr. 45, Klaksvík, beliggende Stoksoyravegur.

Auktionen er begæret af advokat Fríða Patursson, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 930683) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 414 m² stor grund. Det bebyggede areal udgør 96 m² i 1 etage.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

Færøernes fogedret, den 11.03.94
Mette Søgaard-Nielsen
dfm.

Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

torsdag den 07. april 1994, kl. 09.50

tvangsauktion, (AS 815/93) over matr. nr. 149 d, Porkeri, beliggende Porkeri.

Auktionen er begæret af advokat Jógvan Ellefsen, Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 11260 (j. nr. 37279) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 625 m² stor grund. Det bebyggede areal udgør 120 m² i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

Færøernes fogedret, den 11.03.94
Mette Søgaard-Nielsen
dfm.

Sinnisbati

Fritiðarhølið í Krossgøtu 15 er oplið mánakvøld kl. 19–22.

AA fundir í Havn

Mánadag: Upplistova, kl. 20.00
Týsdag: Háskúlin, kl. 20.00
Mikudag: Vaskarlið í Tórsgøtu 5, kl. 20.00 (sporafundur)
Friggjadag: Vaskarlið í Tórsgøtu 5, kl. 20.00
Upplistova, kl. 22.30
Leygardag: Upplistova, kl. 17.00 og kl. 22.30
Sunnudag: Upplistova, kl. 11.00 og kl. 17.00 (opin fundur)

Al-Anon fundir í Havn

Týsdag: Vaskarlið í Tórsgøtu 5, kl. 21.00
Hósdag: Vaskarlið í Tórsgøtu 5, kl. 21.00